



Prinsipp fyri grøna fasadu (40 % vetrargrønt, 60% leyvfellandi/staudur)
Ymiskur planturnar ið vaksa á vegginum hava ymiskar vakstrartíðir,. og tískil gerst fasadan ein livandi organisma, sum fylgir árstíðunum og skiftir dám hareftir.

GRØN FASADA - SUMMAR



GRØN FASADA - VETUR



BURÐARDYGD



Dømi og íblástur

ÁRIN Á OG AV BYGNINGINUM

Samansetingin av límtræskonstruktón og flagtekju í byggitilgongdini hevur nógvar ágóðar við sær, ið eru við til at minka um kolevnisslóðina (t.e. CO2-útlátið). Hesin tekstur lýsir tey ymisku tilfarsvalini í mun til burðardygga bygging.

Við at velja trælímssúlur sum berandi høvuðskonstruktión slepst samstundis undan meira siðbundnum tilfari so sum stáli ella betongi, ið hava munandi større kolevnisútlát í framleiðsluni. Bjálvingartilfar so sum steinull minka um hita- og orkutap; og hervið verður hitingar- og kølingartørvurin lægri.

TILFAR

Við at nýta timburrevlar og træplátur á yvirflátum innan kunnu káplar og aðrar innleggingar leggjast á ein meira smidligan hátt – og hervið verður tørvurin á eyka tilfari og orkunýtslu avmarkaður mest møguligt. Flagtekjan veitir náttúrliga bjálving, ið samstundis minkar um ovhiting um summarið og hitatap um veturin – og soleiðis minkar flagtekjan um orkutørvin. Harafturat hjálpir grasið og vøksturin á flagtekjuni at halda karbondioksid burtur frá lofthavinum; soleiðis virkandi sum eitt "kolevnis-frárensl" (á enskum: carbon sink, á donskum: CO2-dræn).

Trælímsbjálkar sum berandi høvuðskonstruktión avmarka tørvin á orkukrevjandi tilfari so sum stáli og betongi.
Við at velja CLT (cross-laminated timber) ella føroyskt framleidd timburelementir til dekk og veggir slepst undan meira vanliga nýttum betongkonstruktiónum, og við hesum tilfarsvali verður kolevnisútlátið munandi skert.
Bjálvingarløgini, eitt nú steinull, minka um ljóðflutning millum hæddir. Hetta styrkir ljóðligu dygdirnar og minkar samstundis um tørvin á eyka ljóðdoyvandi átøkum.
Niðurhongd ljóðdoyvandi loft styrkja ljóðligu dygdirnar enn meira, samstundis sum tey velta eyka bjálving.

DEKK Á LENDI

Meginparturin av gólvinum í almennum rúmum verður slípað betonggólv. Tó í køki og á vesum verða flísar. Í tøknirúmum og øðrum kjallararúmum verður málað gólv.

ONNUR DEKK

Nýtslan av timbri, flísum og linoleum sum tilfar til gólv avmarkar tørvin á orkukrevjandi tilfari so sum betongi. Hetta tilfar raðfesta vit til øll gólv í erva í bygninginum.

Nýtslan av trýstfastari bjálving og dampsperrum er við til at tillaga inniluftina, og við hesum avmarkast tørvurin á alt ov stórari hiting og køling. Gólvhitaskipanir skapa gott inniklima og effektiva orkunýtslu, og harvið avmarkast yvirskipaða orkunýtslan.


SAMANUMTØKA

Yvirskipað kann staðfestast, at sameiningin av límtræskonstruktiónum, løttum timburelementum og flagtekju í byggingini minkar um kolevnisútlátið í stóran mun samanborið við meira vanligar byggihættir í Føroyum. Nýtslan av burðardyggum tilfari, effektivari bjálving og náttúrligum tilfari so sum flagtekjum skapa saman eitt úrslit við lægri orkunýtslu og útláti og harvið einum meira umhvørvisvinarligum bygningi.


Yvirskipað CO^2 útlát

11.00
kg CO^{2e} / m2 / ár
45.5% kemur frá tilfarðinum

Í Danmark er markið fyri CO2 útlát frá ella rakstrinum av nýggjum bygningum sett til í mesta lagi 12kg/m²/ár fyri bygningar stórri enn 1000 m²



(The life-cycle assessment is carried out with One Click LCA, a life-cycle assessment cloud software, in compliancy with EN 15978, EN 15804, ISO 14040, ISO 14044 and ISO 21929. The LCA datasets are compliant with EN 15804 or ISO 14040/14044.)



Prinsipp: Nýggji felagsbygningurin er umgirdur av grønum økjum, og úr arbeiðsplássum og undirvísingarhølum er útsýni og/ella atgongd til grøn felagsøki

VISJÓN - LANDSLAG

Framtíðar Kampus skal vera eitt livandi umhvørvi, har lesandi, starvsfólk og vitjandi hittast og hava sína dagligu gongd. Kampusøkið er bæði landslagið rundan um og lívið inni í og ímillum ymsu bygningar.

Grønu økini rundan um felagsbygningin eru við til at styðja upp undir visjónina um kampusøkið sum eitt opið, innbjóðandi og savnandi øki á einum serstøkum stað í býnum.
Staðsetingin av nýggja Felagsbygninginum og komandi kampusøkinum sum heild er sermerkt.
Økið er partvís tættbygt; verandi skúlabygningar, stovnar og vinnufyritøkur eru nærhendis, samstundis sum nógvir búðstaðir, meginparturin sethús, mynda grannalagið. Tó er økið eisini náttúruvakurt, og stóra økið við Debesartrøð – við stórum vøkrum klettum og gomlum trøðum – gevur økinum ein serligan dám. Gott útsýnið er yvir býin, og sambandið við restina av býnum er gott – bæði hjá fólki til gongu, á súkklu og við bussi.

Visjónin er, at hesi eyðkennini vera tikin við í nýggja Felagsbygningin. Sambondini uppá tvørs og við grøna umhvørvið skal vera týðiligt, inni sum úti. Felagsbygningum verður grønur – bæði við grønunum gerðum, grønum felagsøkjum inni í bygninum, eins og stórur partur av fasaduni verður grønur.
Uttandura grønu økini skulu vera fjølbroytt. Tað verður bæði møguleiki fyri at uppihalda seg í størri og smærri bólkum uttandura, eins og tað skal vera møguligt at finna eitt stað at hugsavna seg og finna ró og lívd – ein friðsæl oasa mitt í høvuðsstaðnum.



Íblástur: Grøni garðurin í Nóatúni skal vera grønur og innbjóðandi, við fjølbroyttum vøkstri og uppihaldsøkjum

GRØNIR FYRIMUNIR

Tað er aldargomul vitan, at grøn økir hava jaliga ávirkan á umhvørvið - og hesi seinnu árini er nógv gjørt á granskingarøkinum fyri at lýsa og prógvgrunda tann stóra og jaliga týdningin, sum skógir, viðarlundir, parkir og vøkstur sum heild hava á fólkaheilsuna og trivnaðin hjá fólki. **Atgongd til grøn økir – náttúru ella urtagarðar við fjølbroyttum vøkstri og ymiskum uppihaldsmøguleikum – stimbrar hugflogið og betrar um heilsuna.** Heilin fær hvíld, tá vit uppihalda okkum í grønum økjum, og kanningar vísa, at náttúran vigar upp ímóti tí kunningarstreymi og strongd, ið vit uppliva í gerandisdegnum.

Hjá summum kann hægri lestur til tíðir vera avbjóðandi við til dømis prógvtøkum og øðrum uppgávum, ið kunnu elva til strongd. Nógvar royndir vísa, at atgongd og útsýni til grøn økir lækkar blóðtrýst og minkar um strongd, eins og innlæring og hugsavnan verður styrkt. **Trygg og fjølbroytt uttandura økir, sum t.d. ein fjálgur grønur** urtagarður ella vøkur upprunanáttúra, kunnu vera ein oasa, sum veitur trygd frá teimum likamligu ella sálarligu avbjóðingum, sum fólk dragast við. Uppihald í urtagarðinum kann kennast sum ein friløta frá øllum tí, sum vanliga fyllir í gerandisdegnum, og kann geva meira orku til at klára avbjóðingar og stúranir.

Fyri starvsfólkið eru somuleiðis nógvir fyrimunir við atgongd til náttúru og vælskipaðar urtagarðar. Vøkur útiøkir fríðka um, prýða arbeiðsplássið og økja um arbeiðsgleði og trivnað. Kanningar vísa, at vøkur útiøkir á arbeiðsplássinum geva starvsfólkum eina kenslu av stoltleika og gleði um at vera partur av einum umhvørvi, sum hevur jaliga ávirkan á tey sjálvi og tey, ið vitja.

Grøn økir geva starvsfólkum eitt stað, sum kann nýtast til ein **friðarligan steðg, sum gevur nýggja orku og hjálp til coping í strongdum** arbeiðisstøðum. Starvsfólk lýsa urtagarðin sum "our little bit of a heaven" (Cooper Marcus, 2009, s. 302).

Samanumtikið kann sigast um fyrimunir við grønum útiøkjum:

- **Fólk í øllum aldri finna tíð og pláss til hugdýping.**
- Náttúran er avbjóðandi og hugvekjandi fyri kropp og sál.
- **Atgongd og útsýni til grøn økir við fjølbroyttum vøkstri hevur jaliga** ávirkan á strongd, lækkar blóðtrýst, og kanningar vísa at fólk, ið hava atgongd og/ella útsýni til grøn økir eru minni sjúk og strongd enn tey, ið ikki hava tað.
- Grøn økir styrkja um samanhaldið; stuðla við innbjóðandi grønum økjum geva teimum, ið arbeiða og lesa á staðnum, eina størri kenslu av stoltleika í mun til arbeiðs- ella lestrarplássið.
- Uppihald í grønum økjum gevur meira yvirskot, og læring verður styrkt av at vera úti í náttúruni.

(Keldur: Konceptmodel for Helseskoven Octovia, Insitut for Geovidenskab, Københavns Universitet, Karsten B. Hansen og Thomas Sick Nielsen: Natur og grønne områder forebygger stress. Skov & Landskab. 2005., Kongelig Veterinær og Landbohøjskole)




Diagram: Løtt atgongd og útsýni til grøn felagsøkir, eggja til rørslu og samanhald, samstundis sum tey geva rúm til eina friðarliga friløtu

LM-071/2023

UPPSKOT – LANDSLAG

Staðsetingin av Felagsbygninginum ovast í Nóatúni ger, at bygningurin verður sjónligur úr stórum parti av býnum. Staðsetingin við Debesartrøð er serstøk og skapar eitt heilt serligt eyðkenni. Náttúrliga lendið og stóru klettarnir fara at geva framtíðar Kampus ein heilt serstakan dám. Tí verða inntriv í verandi lendi bert gjørd í tann mun, tað er alneyðugt, soleiðis at verandi vøkstur og eyðkennir í allarstørsta mun vera varðveitt.
Høvuðsinngongin til nýggja Felagsbygningin vendur út ímóti Frælsinum. Tilkoyring verður eftir einum nýggjum atkomuvegi, sum í framtíðini fer at binda gamla Venjingarskúlan og komandi bygningar á fløtuni á Frælsinum saman við nýggja Felagsbygningin. Vegurin verður lagdur sum ein grøn allé, har trø, ið hóska til staðbundna umhvørvið og veðurlagið, verða gróðursett.
Torgið frammanfyri høvuðsinngongina er rúmligt, og pláss er til avseting við bili, eins og súkkluparkering er staðsett nærhendis inngongdini. Smáir lummar til uppihald eru rundan um atkomutorgið, og hetta økið fer í framtíðini at vera ein sambindingarliður ímillum ymsu deildirnar, sum liggja kring felagsbygningin.
Norðanfyri Felagsbygningin liggur órørdi "upprunagarðurin" við stóru, vøkru klettunum. Økið er væl vart fyri vindi og hevur framúr samband til økið kring Debesartrøð. Upprunalendið sleppur heilt inn at fasaduni og í fluttari merking eisini inn í kjarnuna í Felagsbygninginum.
Sambandið út til økið við Debesartrøð ger, at tað kennist natúrligt ikki at planta viðarvøkstur uppat bygningunum á norðursíðuni, men hinvegin at loyva verandi lendi at koma heilt innat fasadunum og partvís inn í bygningin.
Stóra innandura trappan skjýtur seg út ígjøgnum fasauna og knýtir inni og úti saman, eins og stóru lendisstigini veita møguleika fyri uttandura uppihaldi, fyrilestrum o.ø.
Á suðursíðuni skapast ein fjálgur, grønur garður ímillum Felagsbygningum, Vinnuháskúlan og Havstovuna. Hesin garður, serliga niðan móti Havstovuni, verður meira kultiveraður við fjølbroyttari gróðurseting.
Sólargangurin seinnapart er sera góður. Garðurin liggur í beinleiðis samband við kantinuna og Marknaðarhøllina og kann tí – umframt at vera nýttur til uttandura máltíðir – vera karmur um annað uttandura uppihald av ymiskum slag: bólkaarbeiði undir smáu hálvtekjunum, ið smoyggja seg undir trækrúnunum, til sálarró og fyrireiking í samband við prógvtøkur og til fríggjadagsbarr.
Harumframt virkar garðurin sum sambindingarliður ímillum Nóatún og Frælsið.

Stóru flísarnir, sum eru gjørdir úr endurnýtslubetongi, verða lagdir í eitt tilvildarligt mynstur, sum tilsamans skapa smá rúm ímillum grønu plantubeðini. Hesi eru beð, sum eru grøn og rúmskapandi alt árið við heimahoyrandi plantum og trøum, ið hóska til føroyska veðurlagið, so sum elri, royn, skútupílur, hyljurunnar, fjallafura og arktiskur pílur.

DEBESARTRØÐ

Tankin er, at stórur parturin av grønu økjunum, serliga økini oman ímóti Debesartrø, vera verandi upprunalendi, soleiðis sum tað liggur í dag. Tað vil siga við smáum heyggjum, stórum klettum og verandi vøkstri. Vit skjóta tó upp, at ein nýggj gøta verður gjørd fyri at knýta kampusøkið betri at Landsbókasavninum og víðari oman á Skálatrøð og í miðbýin.
Útiøkini kring Kampus fara at virka sum ein sambindingarliður til nærumhvørvið. Verandi og komandi gøtukervi gera, at núverandi økir í Kampus og framtíðar Felagsbygningur hanga saman og gerast ein natúrligur partur av grannalagnum.

VIÐLÍKAHALDSÆTLAN FYRI GRØNU ØKINI


Útiøkini á norðursíðuni vera í størstan mun verandi hagalendi, sum krevur lítið og onki viðlíkahald, men heldur skal varðveita upprunadámin.

Í tí sunnara garðinum vera plantaðar plantur, sum krevja minst møguligt viðlíkahald ígjøgnum summarið.
Tá blómur og staudur byrja at følna um heystið, vera topparnir skornir av, men bløð og stelkar fáa loyvi at verða liggjandi (fyri at verja røturnar), inntil tað aftur fer at spíra, tá várið kemur.

Runnar vera skornir 1/3 niður um heystið – ella tá teir hava mist ber og blómur.

Fyri at tryggja at trøini ikki vaksa seg ovurstór, verður hvørt vár – áðrenn bløðini spretta – tynt út í smáum greinum eftir tørvi. Um tørvur er á at skera størri greinar, verður hetta gjørt í august ella september.
Plantur eiga at vera av føroyskari framleiðslu, og endalig plantusamanseting eigur at vera gjørd í samráð við Gróðurstøðina. Hetta bæði fyri í størstan mun at tryggja, at valdu plantur og viðarsløg trívast og støðast, og fyri í størst møguligan mun at verja náttúru og plantulív.




LM-071/2023
NÝGGJ ATKOMA TIL VERANDI SETHÚS
DEBESARTRØÐ
AA
VARÐVEITT UPPRUNA LENDI
TAKTERRASSA
PLAGTEKJA
TAKTERRASSA
BB
NÓATÚN
VINNUHÁSKÚLIN
GRØNUR BARÐUR
HAVSTOVAN
HORNABØ
FØROYA FØLKAHÁSKÚLI

MIKROKLIMATISKAR KANNINGAR

UNIVERSAL THERMAL COMFORT INDEX (UTCI)

Hettar altjóða indeksið (UTCI) er ein háttur at máta hvussu hiti uttandura ávirkar tað menniskjaliga likamið. Tað tekur hædd fyri faktorum sum luft hiti, væta í luftini og vindi, so væl sum stráling frá sólini og øðrum keldum/flatum.
Prinsippið tekur somuleiðis hædd fyri hvussu fólk tilpassa teirra klæðir alt eftir hvussu veðrið er.
Tá UTCI er millum 9 og 26 stig Celsius, kenna vit vælveru og vera ikki strongd av hvørki hita ella kulda. Tó um hitin vit kenna á okkum gerst ov høgur ella lágur byrja vit at kenna okkum illa.
Í hesum ávísa døminum siggja vit at um vit tryggja uppihald í sólini samstundis sum vit hava lívd fyri vindi, so kunna vit økja tíðina har vit kenna okkum væl uttandura við 150 døgum um árið, tí skal hettar sjálvandi nýtast sum eitt aktivt amboð í tilevning av røktarheiminum og uttanumøki tess.




+150 dagar afturat har vit kenna okkum væl við góðari lívd fyri vindi


45 dagar har vit kenna okkum væl er støðan í dag.


Útgangsstøði






Sól og lítil vindur










Árlig vindrósa, mest vanlig ætt: Vestan





Vindrósa

Flest vanligu vindættir

70 ° vestan

Við at nýta teldusimulerað vindmodell fingu vit týðandi innlit í vindmynstrið og hitalagsskiftini kring kampus alt árið. Hetta vísindaliga tilfar gjørdi okkum før fyri at nýta passive design strategiir á effektivan hátt. Vit optimeraðu orienteringina av bygningunum, formgeving og staðseting av vindeygum fyri at gagnnýta náttúrlig vindmynstur, samstundis sum vit høvdu í huga at avmarka ávirkanina av nógvum vindi til eitt minstamark. Harafturat eyðmerktu vit øki við tendensi til sveiggj í hitalagnum, soleiðis at vit vóru før fyri at taka atlit til hita og skugga fyri at tillaga hitalagið innandura. Úrslitini av teldusimulatiónunum leiddu okkara avgerðir í tilgongdini fyri at tryggja umhvørvisvinarliga og burðardygga sniðgevan, ið raðfestir bæði brúkaranøgdsemi og orkugagnnýtslu.





Verandi umstøður



Kanningar av verandi umstøðum, vísa hvussu vindumstøðurnar eru á kampusøkinum og í kringliggjandi økjum.




Viðevskatur staðsettur á røttum stað skapar lívd á økinum og økir harvið um vælveruna í uttandura økjum, og betrar tískil um møguleikarnar fyri uttandura uppihaldi.


Vindur og lívd

16 ættir

Í okkara passive design tilgongd gjørdu vit vindsimulatiónir av 16 ættum og nýttu Lawson (1978) Wind Class skipanina til áseta veðurlagið í mun til vind. Hetta háttalag nýtir hagfrøðiligt tilfar, m.a. vindferð og vindætt, fyri at allýsa lívdargevandi støð í umhvørvinum kring bygningin.

26% betran





Verandi umstøður




Á nýggja kampusøkinum eru 26% meiri lívd, í mun til verandi umstøður.




Bygningar og vøkstur sum eru staðsett við útgangsstøði í lokala veðurlagnum, eru við til at geva eina munandi betring av mikroklimatisku umstøðunum á økinum.

Sólviðurskifti

Í okkara sniðgeving løgdu vit stóran dent á týdningin av atgongd til sól í mun til góðskuna av bæði uttan- og innandura økjum. Í hesum sambandinum framdu vit víðfevndar árstíðarmerktar og árligar greiningar av kampusøkinum. Hesar greiningar loyvdu okkum at skilja, hvussu skapið og orienteringin av bygningunum at kalla bjóðaðu sólarljósinum inn til kampusøkið og fasadurnar á ein dygdargóðan hátt. Við at sniðgeva og staðseta bygnaðin strategiskt hava vit optimerað sólareksponering og harvið tryggjað væl upplýst, hágóðsku innandura øki. Hendan sameining av sólarljós-greiningini hevði ein týðandi leiklut í mun til at tryggja orkugagnnýtslu, at styrkja brúkaranøgdsemi og ikki minst í mun til at skapa eitt lívligt og innbjóðandi kampusumhvørvi.





Verandi umstøður





Atgongd til sól og lívd samstundis, er ein avgerandi fyri uttandura vælveru.


LM-071/2023

LM-071/2023


Teldumynd : Torgið

LM-071/2023


FLATMYND




LM-071/2023


Uttandura fyrilestur ein góðan summardag
PALLUR
GRØNUR VEGGUR
UNDIRVÍSINGARHØLI
UNDIRVÍSINGARHØLI
INNGANGUR
DEBESARTRØÐ
TORG
151,8 m²
BÓLK
14,8 m²
LIFT
7,6 m²
MATARSTAD
LESBALUR
Friggjadagsbarr aftaná almennan fyrilestum um laksalús
KANTINA
270,7 m²
GRØNUR VEGGUR
Terrassa
Terrassa
GRØNUR VEGGUR
Sykkluparkering
Verandi parkering umskipa
Flatmynd1:200


SKURÐIR







Tvørskurður 1:200




Longdarskurður 1:200

LM-071/2023



Teknamynd : Stóri multifunktionelli fyrilestrarsalurin, sum kann hýsa alskyns tiltøkum.

FRAMSÍÐUR




Framsíða eystur 1:200



Framsíða vestur 1:200

FRAMSÍÐUR









Framsíða norður 1:200




Framsíða suður 1:200

HØVUÐSTEKNINGAR






Plan -2. hædd, 1:200




Plan -1. hædd, 1:200

VINNUHÁTTUR

HØVUÐSTEKNINGAR






Plan 0.hædd, 1:200


HØVUÐSTEKNINGAR






Plan 1.hædd, 1:200

HØVUÐSTEKNINGAR





Plan 2.hædd, 1:200